# 1.890 fylgdu við

Nógv hevur verið gjørt burtuúr, at ov fáir áskoðarar hava sýnt føroyska fótbóltslandsliðnum ans seinastu tíðina. Vónin var helst, at Tórsvøllur kundi mest sum fyllast leygardagin, men sum ikki eina ferð argaði føroyska veðurlagið. 1.890 fólk valdu tó at treiskast móti hesum, og saman fingu hesi eina ógloymandi løtu, tá Bogi Løkin skoraði til 1-0. Gleðin var kanska stokkut, men ein javnleikur er væl eisini til at liva við. Og verða fleiri avrik av hesum slagnum, er einki at ivast í, at fjøldin verður størri, tá undankappingardystir aftur eru á skránni í juni mánaði í 2009.



# Bogi kendur í Eysturríki

Flestu eysturríkarar, sum hava fylgt væl við landsliðsfótbólti hava higartil kent nøvnini á tveimum føroyskum landsliðsspælarum, Torkil Nielsen og Jens Martin Knudsen. Torkil fyri málið í Landskrona, og Jens Martin fyri branddystin hann stóð í Landskrona við legendarisku topphúgvini á høvdinum. Í hesum døgum stendur nógv at lesa um ein 19 ára gamlan, arbeiðsleysan runavíking, sum ætlar sær at fara og lesa í næstum. Heimasíðan www.goal.com skrivar: "Arbeitslos, aber nicht torlos" = "Arbeiðsleysur, men ikki mál-leysur" í síni lýsing av unga NSÍ-spælaranum. Heimasíðan skrivar, at teir væl betaltu yrkisspælarnir hjá Eysturríki vóru skotnir í senk av einum ungum, arbeiðsleysum amatøri. Eisini er samrøða við Boga á heimasíðuni, Á www.laola1.at

*Ein nýggj liðmynd mátti sjálvandi takast av teimum veteranunum, sum vóru møttir á Tórsvølli. Standandi eru tað Jákup Simonsen, liðleiðari, Kaj Leo Johannesen, Torkil Nielsen, Tummas Eli Hansen, Mikkjal Danielsen, Jóannes Jakobsen og Bjarni Joensen, liðleiðari. Húkandi eru Abraham Løkin (tá Hansen), Jens Erik Rasmussen, Kári Reynheim, Gunnar Mohr, Allan Mørkøre og Jan Dam*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Hetjurnar heiðraðar

**Sum tað sømdi seg á degnum, so vórðu Landskrona-hetjurnar róptar út á vøllin í hálvleikssteðginum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir verða ongan tíð gloymdir. Jens Martin, Jóannes, Tummas Eli, Mikkjal, Julian, Jan, Abraham, Torkil, Kári, Allan og Kurt.

Teir ellivu, sum vóru á vøllinum í Landskrona vóru sjálvandi bodnir í VIP-rúmið á Tórsvølli, nú Eysturríki vitjaði, og eftir at unglingarnir, sum nú manna landsliðið, høvdu hitað fjøldina upp í trý korter,var tað tíð hjá hetjunum at koma á vøllin.

Fagnaðurin var øgiligur, og hann gjørdist ikki minni, tá sjálvur løgmaður kom at heilsa. Tað var nú ikki bara sum løgmaður, at Kaj Leo Johannesen heilsaði, tí hann var eisini eykamálverji fyri Jens Martin Knudsen á minniliga degnum. Saman við honum sótu Magni Jarnskor, Jens Erik Rasmussen, Gunnar Mohr og Poul Enok Hansen eisini á beinkinum. Venjari var sjálvandi Páll Guðlaugsson.



# Upp á tíðina

**- Vit hava verið í hesi støðuni fyrr, so í steðginum kundu vit bara staðfesta, at enn var arbeiðið bara hálvgjørt, sigur Atli Danielsen**

*Atli kundi bara taka undir, tá fólk hildu fyri, at hetta var upp á tíðina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»Tað var upp á tíðina!«

Setningurin varð sagdur aftur í mixed-zone økinum, har fjølmiðlarnir kunnu fáa orðið á spælarar eftir altjóða dystir. Og Atli Danielsen kundi bara taka undir við hesum, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

- Tað hevur jú verið so nær við so ofta hjá okkum, so hetta var ein øgiligur lætti, staðfesti hann.

Tað sá út til, at tit fingu hampuliga gott pláss á vøllinum. Vóru tit bilsnir av, at trýstið ikki gjørdist størri frá fyrsta bríksli?

- Ja. Vit væntaðu faktiskt, at teir komu at hava fleiri fólk inni á sentrala miðvøllinum. So kanska fingu vit betri tíð, enn vit høvdu roknað við. Og eg haldi eisini, at vit dugdu at gera okkum dælt av hesum.

Tit høvdu longu fyri steðgin einar tveir-tríggjar heilt góðar møguleikar. Hvat tosaðu tit um í steðginum?

- Akkurát hasa kensluna hava vit ofta havt í hálvleikinum, so vit tosaðu um, at arbeiðið var bara hálvgjørt enn. Og at vit máttu út at geva okkum minst líka nógv eftir steðgin.

Men tit skora so alt fyri eitt eftir steðgin. Hvat fór ígjøgnum høvdinum hjá tykkum tá?

- Tað var í øllum førum ein øgilig gleði, sum var hjá okkum. Men tað var nú keðiligt, at teir skora alt fyri eitt, so tú kanst siga, at tann gleðin var stokkut.

Seinastu løtuna tóktist ikki, sum var nakað serliga nógv eftir í tykkum. Vóru tit púrasta útlúgvaðir?

- Ja, tað vóru vit. Vit skiftu eisini skipan, so vit vóru tríggir mitt á. Teir spældu jú við nógvum longum bóltum hesa løtuna, so vit máttu samla væl upp. Men vit koyrdu so bara á av øllum alvi, og tíbetur gekk tað so hesaferð.

- Og hetta ger tað so sjálvandi munandi lættari hjá okkum at fara til Litava. Móðin er sjálvandi enn til staðar, men sjálvsálitið er munandi betri, nú vit hava prógvað, at vit kunnu fáa stig, sigur Atli Danielsen.